# Bygdaráðsfundur

**Bygdaráðsfundurin hin 24.01.2011**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarsalurin | |
| Hjástødd vóru: | Símin Johannesen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Johannus Danielsen | x |
| | Jákup M. Kjeld | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Petur J. Petersen | x |
| | Elin á Torkildsheyggi | x |
| | Alfred Olsen - skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 1/2011**
(Mál nr. 173/2010 Fíggjarmál).
J. nr. 2009-0011-0018
Fíggjarætlanin fyri 2010 var gjøgnumgingin og viðgjørd í **Fíggjarnevndin seinast í nov. 2010, og mælti nevndin til at gera hesar broytingar til fíggjarætlanina fyri 2010, sum vóru samtyktar á bygdaráðsfundinum 06.12.2010.**
**Men allar broytingar í fíggjarætlanini hjá kommununi skulu hava tvinnar viðgerðir, og tí er samtykta broytingin aftur til viðgerðar.**
Broytingin er:

| **§5** | **lønir** | **Tilfar/viðlh.** |
|---|---|---|
| Jólahald | -15.000 | -10.000 |
| **§6** | | |
| Fastogn | 80.000 | 40.000 |
| Fríðkan | -50.000 | |
| Bøgarðar | 20.000 | -60.000 |
| Jarðarferðir | | -10.000 |
| Vatn | -30.000 | |
| Kloakk | -70.000 | -20.000 |
| Vegir | 65.000 | -100.000 |
| Gøtuljós | | 30.000 |
| Viðlh. Bil v.m. | | -40.000 |
| **§7** | | |
| Havn | | 100.000 |
| **Í alt** | **0** | **- 70.000** |

**Hesin peningurin (kr. 70.000) mælir Fíggjarnevndin til, verður tikin av konti ”rentuútreiðslum”.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 2/2011 Fíggjarmál.**
J. nr. 2011-0011-0023
Kongshavnar Havn hevur lagt eina rakstrarætlan fyri 2011 og hevur sent hesa til støðutakan við vón um, at kommunurnar taka undir við løgdu rakstrar-ætlanini fyri 2011.
Kongshavna Havn vísur á, at seinastu 5 árini er skipaferðslan á Skálafjørðinum minka munandi og tí er neyðugt at marknaðarføra Skálafjørðin munandi meira í framtíðini, og framgongur hetta av rakstarætlanini fyri 2011.
Høvuðstølini eru hesi:

| | Ætlan 2011 | ætlan 2010 | rokn. 2009. |
|---|---|---|---|
| Havnagjøld | 641.000,- | 670.000,- | 488.436,45 |
| Uppkrevjingargjøld | - 160.250,- | 167.500,- | 122.109,11 |
| Inntøkur netto | **480.750,-** | **502.500,-** | **366.327,34** |
| Rakstarkostnaður | - 229.500,- | 201.500,- | 206.397,24 |
| Úrslit áðrenn rentur | 251.250,- | 301.000,- | 206.397,24 |
| Rentuinntøkur v.m. | 15.000,- | 35.000,- | 11.112,00 |
| Ársúrslit | **266.250,-** | **336.000,-** | **171.042,10** |

**Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna rakstrarætlanina hjá Kongshavnar Havn fyri 2011, soleiðis sum hon er uppsett.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 3/2011 Mentamál.**
J. nr. 2011-0023-0088.
Í skrivi dagfest 08.01.2011 mælir Súni í Hjøllum til, at Mentanarnevndin skipar fyri, ella leggur lunar undir nýggjárshaldið í 2011.
Hetta kann sjálvandi gerast uppá fleiri mátar, sum Mentanarnevndin eigur at viðgera nærri á komandi fundi.

**Mentanarnevndin mælir til, at farið verður undir at fyrireika eitt nýtárshald í 2011, møguliga saman við feløgum v.m..**
**Nevndin mælir til, at kommunan miðar ímóti at hava funnið ein leist, fyri hvussu nýtárshaldið skal vera, áðrenn farið verður í summarfrí.**

**Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 4/2011 Mentamál/tekniskt mál**
J. nr. 2011-0022-0001
Reglugerð fyri kirkjugarðin, sum er frá 1997, treingir til at vera endurnýggjað og dagførd.
Nú umfatar arbeiðið í kirkjugarðinum bæði tekniskar ásetingar og umsiting og tí kemur reglugerðin til viðgerðar bæði í Teknisku nevnd og Mentanarnevndini, tí ásett er í Reglugerðini, at umsitingin av kirkjugarðinum kemur undir málsøkið hjá Mentanarnevndini.

Men endamálið við at taka reglugerðina upp til viðgerðar nú, er at fáa hesa dagførda.

**Mentanarnevndin mælir til, at hetta verður sent til ummælis hjá kirkjugarðsnevndini í kirkjuráðnum.**
**Tekniska nevnd hevur viðgjørt sama mál, og hevur sama tilmæli sum mentanarnevndin.**
**Tá svar er komið frá kirkjuráðnum, verður málið tikið upp aftur til viðgerðar í nevndunum.**

**Tilmælini frá Mentanarnevndini og Teknisku nevnd vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 7/ 2011, Byggimál.**
J. nr. 2011-0042-0282.
Í umsókn komin 24.08.2010 søkir Asbjørn Vang um byggiloyvi til uppíbygging til sethús síni uppi á Hamri.
Uppskot til grannasáttmála fyriliggur og tekningar av uppíbyggingini, umframt tekning frá Teknisku deild.

**Tekniska nevnd mælir til at játta Asbjørn Vang byggiloyvið til ætlaðu uppíbygging samb. innsendu tekning eftir teimum galdandi treytum í byggisamtyktini í kommununi.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 8/2011 Vegamál.**
J. nr. 2011-0044-0037
Í skrivi dagf. 10.01.2011 vísir Súni í Hjøllum á, at ljóssteyrarnir á Agninum eru í vánaligum standi og biður um, at kannað verður hvør kostnaðurin er at gera gøtuljósini av nýggjum, leggja verandi luftlinju í káplar og hvussu umfatandi arbeiðið er.
Her vera SEV og landsverk, tí Agni er landsvegur, eisini partar av arbeiðinum og mælir Súni til, at málið, tá kanningararbeiðið er gjørt, verður lagt fyri bygdaráðið, so støða kann takast til, nær hetta kann gerast.

**Tekniska nevnd mælir til, at taka hetta upp á fundi við landsverk í vár, áðrenn kommunan ger nakra kostnaðarmeting av hesum arbeiðinum, sum bæði umfatar økið hjá Landsverk og SEV.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 9/2011 Havnamál.**
J. nr. 2011-0046-0049
Í skrivi dagfest 30.12.2010 heitur leigari av egningaskúri, á kommununa um at betra um viðurskiftini í egnaskúri teirra, við tað at gólvið í skúrinum nú er í so

ringum standi, við nógvum rivum, at tað er sera trupult at halda reint. Hann metir, at rivurnar eru komnar av teimum nógvu spreingingunum sum eru farnar fram í nánd av skúrunum, t.d. á havnalagnum og skúlaútbyggingini.
Til seinast vísur hann á, at kommunan er eigari av egningaskúrunum og tí má metast, at viðlíkahaldsskyldan hvílur á kommununi.

**Tekniska nevnd mælir frá, at kommunan ger gólvið, út frá galdandi sáttmála, tí at slit og rivur í gólvinum, kemur undir vanligt viðlíkahald.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 11/2011 Jarðarmál.**
J. nr. 2010-0048-0066
Í umsókn dagfest 27.08.2010 søkja Rúni í Hjøllum og Hallfríð H.í Hjøllum, um eitt uppískoytisstykki til verandi grundstykki teirra matr. nr. 511 uppi í Nýggjagerði.
Umsóknin er síðani send til grannin sunnanfyri, tí uppískoytistykkið kemur suður yvir grundstykki hansara.

*Grannin hevur 17.01.2011 tosað við kommununa ,pr. tlf., og boðað frá, at hann ikki hevur nakað ímóti, at nevnda broyting verður gjørd.*

**Tekniska nevnd mælir til, at Rúni og Hallfríð kunnu keypa umsøkta uppískoytisstykkið, til grundstykki teirra.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**
**Súni í Hjøllum var úti, meðan málið var viðgjørt.**

**Mál nr. 12/2011 Umhvørvismál.**
j. nr. 2011-0047-0022.
Í umsókn dagfest 03.01.2011 søkir EFFO og Navia um byggiloyvi til 3 nýggjar vindmyllur í Nes haga úti á Eystnesi, ella í framhaldi av verandi vindmyllum suðu rmóti Nesvatni og byggiloyvi til transformarahús.
Tekningar eru viðlagdar.

**Tekniska nevnd mælir til at geva teimum eitt prinsipielt byggiloyvi, við somu treytum sum hinir umsøkjarar hava fingið.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**
**Elin á Torkildsheyggi var úti, meðan málið var viðgjørt.**

**Mál nr. 13/2011 Vegamál**
J. nr. 2011-0044-0038

Landsverk hevur gjørt eitt uppskot um samstarvsavtalu um kavarudding frá Agninum og eystur í Líð, sum er galdandi frá 1. nov. fram til 30. mai 2011. Kostnaðurin er 10,00 kr. pr. m fyri graving og 25,00 kr. pr. m fyri graving og salting.
Tekniska nevnd skal koma við einum tilmæli til bygdaráðið.

**Tekniska nevnd mælir til at svara Landsverk, at sum nú er, so grevur og saltar kommunan Agnið niðan til Kornvatn, meðan Landsverk gravar eystur í Líð, og avtalan kann tí ganga út uppá, at hesi vegastrekkir ganga upp móti hvørjum øðrum og at ongin gjaldsavtala, men ein samstarvsavtala, skal vera galdandi millum Landsverk og Nes kommunu.**

**Bygdaráðið samtykti at taka undir við avtaluni hjá Landsverk, um at Landsverk grevur og saltar Agnið, sum er landsvegur.**
**Harumframt gravar landsverk tann kommunala vegin frá Agninum og eystur í Líð, móti einum føstum gjaldið uppá 15.000,00 kr. um árið. – saltingina á hesum vegastrekki tekur kommunan sær av.**

**Mál nr. 14/2011 Vegamál.**
J. nr. 2008-0044-0014
Fundur hevur verið millum Nes- og Runavíkar kommunu 11.01.2011 um íbindingina í landsvegin inni í Runavík vestan fyri skúlan við Løkin og har tekn. deild boðaði frá, at teir hildu fast við íbindingina og vegaføringina sambært uppskotið nr. 3 dagf. 09.10.2006, sum var gjørt nakað meir við, og hevði tikið vegaføringina vestureftir í Nes kommunu burtur úr, so íbindingin nú er frá landsvegnum og beint niðan í økið hjá Nes kommunu. Hesa vegaføringin ætlar Runavíkar kommuna at senda til LV og biða um íbinding fyri.
Tekn. Deild ynskir at fáa at vita, hvat Nes kommuna sigur um hesa vegaføring. Tekniska nevnd skal viðgera hetta og boða Runavíkar kommunu frá niðurstøðuni.

**Tekniska nevnd mælir til at góðtaka fyriliggjandi uppskot.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 15/2011 Trivnaðarmál.**
J. nr. 2011-0031-0106
Nes kommuna hevur í umsókn dagf. 30.08.2010 søkt um 279.000,00 kr. til stuðul til mattænastuna í 2011.
Í skrivi dagf. 14. des. 2010 boðar Nærverkið frá, at tey hava avgjørt at sýta umsóknina til hølisleigu uppá 119.000,00 kr.
Í skrivi dagf. 14. des. 2010 boðar Nærverkið eisini frá, at tey hava avgjørt at játta kommununi 66.141,00 kr. til umsorganararbeiðið í 2011, treytað av at endaliga játtanin verður í samsvar við fíggjarlógaruppskotið.

Raðfestingin hjá teimum er, at mættanastan fær fyrsta prioritet og útkoyringin næsta prioritet. Men orsakað av, at játtanin er 2,806 mió. kr. og umsóknirnar frá kommununum eru uppá 5,448 mió. kr. hava tey gjørt av, at játtað 73 % av játtanini til raðfestin 1 (mattænastan) og at játtað 27 % av játtanini til raðfestin 2 (koyritænastan).

Í øllum førum vísa tey til, at henda avgerð hjá teimum kann kærast innan 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi (sum var 17. Des. 2010) til Kærunevndina í Almanna- og Heilsumálum, Skálatrøð 20, 100 Tórshavn.

**Trivnaðarnevndin mælir til, at kommunan kærir avgerðina hjá Nærverkinum, í eini roynd at fáa hækkað játtanin fyri 2011.**

**Tilmælið frá Trivnaðarnevndini var einmælt samtykt.**